# SKREKKURIN ER AT VERA EINSAMALLUR

## – og fáa »hole in one«

- TEY FLESTU HALDA, AT GOLF ER EIN ÍTRÓTTUR FYRI SNOBBAR OG RÍK FÓLK. MEN TAÐ ER LANGT FRÁ SANNLEIKANUM. AT SPÆLA GOLF ER GOTT FYRI BÆÐI LIKAM OG SÁL, OG VIT FÁA NÓGVA FRÍSKA LUFT Í FANTASTISKUM UMHVØRVI. TAÐ GÓÐA ER, AT ALLIR ALDURSBÓLKAR OG BÆÐI KYNINI KUNNU VERA VIÐ. TAÐ SIGA FINN JENSEN OG OSKAR EIRIKSSON, SUM BÁÐIR ERU ÍDNIR GOLF'ARAR

GOLF

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo
Myndir: Sunva Eysturoy Lassen

- Tað ringa við golf er, at tú hevur so nógva tíð at hugsa teg um í. Tá tú spælir batminton ella tennis, reagerar tú instinktivt, men tá tú spælir golf, hevur tú langa tíð at hugsa teg um í. Og onkuntíð kann man hugsa for nógv. Tað er eitt mentalt krevjandi spæl, sum í høvuðsheitum gongur fyri seg millum oyrini, greiðir Finn Jensen, sum er fastur fúsur á golfvøllinum á Glyvursnesi, frá.

Tórshavnar Golfklubbi hevur einar 150 limir, harav eini 30 spæla regluliga. Av teimum 30 eru eini 4 konufólk. Tað halda Finn og Oskar vera stórt spell, tí golf hóskar seg sera væl til konufólk. Men bæði áhugin og talið av limum økist tó spakuliga.

– Vit hava fleiri limir, sum búgva uttanlands, og sum koma heim í feriunum at spæla golf, vísir Finn á.

Oskar skoytir uppí, at tað eisini eru nógv fólk, sum koma út á Glyvursnes at royna seg í golfspælinum, t.d. fyritøkur, sum hava starvsfólkadagar, ella fólk, sum eru í polterabend.

- Vit hava nógvar gestir, sum koma út at royna at sláa nakrar bóltar til stuttleikba. Og tað eru fólk vælkomin til, sigur Oskar.

Tað ber eisini til at bíleggja sær ein ókeypis royndartíma, har tú fært høvi at royna teg saman við einum av meiri garvaðu spælarunum. Soleiðis kanst tú síggja, um golf er nakað fyri teg. Skipað verður eisini fyri skeiðum um veturin, har høvi er at læra reglurnar –bæði tær skrivaðu og tær óskrivaðu.

### Gott til ferðafólk

Umstøðurnar at spæla golf í Føroyum eru ikki serliga góðar, men golf'ararnir eru glaðir fyri tað, teir hava. Teir vísa tó á, at um umstøðurnar vórðu betri, kundi tað verið sera attraktivt fyri ferðafólk.

- Ferðafólk, sum koma til Skotlands at spæla golf, leggja 80 milliardir krónur eftir seg. Tey skulu jú bæði búgva og eta meðan tey eru og spæla golf. Og skotar hava dugað væl at marknaðarført seg. Eisini Ísland er við at gera vart við seg sum golf-land. Vit síggja, at Norrøna er full av týskarum, sum fara til Íslands at spæla golf. Men eingin steðgar her, vísir Oskar á.

Hann sigur, at av øllum teimum mongu ferðafólkunum, sum hvørt summar liggja við kai í Havn, eru heilt víst mong, sum fegin vildu sloppið at spælt golf.

- Vit vita, at tað eru nógvir fyrispurningar. Men umstøðurnar eru ikki til tað, tíverri. Tað er spell, tí Glyvursnes, har golfvøllurin liggur, telist millum heimsins vakrastu golfstøð. Vit hava fantastiskt útsýni og síggja bæði Eysturoynna, Norðoyggjar og Nólsoynna. Vit ganga bæði í haganum og framvið sjóvarmálanum, so umframt sjálvt golfspælið, so er tað eisini ein fantastisk náttúruuppliving, vísir Finn á.

### Oyggjaleikir

Tað er ilt at síggja, hvussu golfspælið í Føroyum kann mennast, um ikki umstøðurnar verða betri. Sum er, hava golfararnir eina bingju til klubbhús, og møguleikarnir at venja sløg, eru ikki góðir. Vøllurin hevur 9 hol, sum mugu spælast tvær ferðir, ístaðin fyri 18 hol, sum er altjóða krav. Men hóast tað, so hava føroyskir golfspælarar tvær ferðir verið við á oyggjaleikunum.

- Oyggjaleikirnir eru okkara størsta mál, og tað er heilt fantastiskt at vera við. Men skulu vit hava nakran møguleika at gera okkum galdandi, so mugu vit hava gongd í ungdómsarbeiðið. Og tað er torført, sum er, tí vit ikki hava nakað veruligt stað at venja okkara sløg. Men okkurt er í umbúnað, so vónandi verður tað ikki so leingi, áðrenn venjingarumstøðurnar eru batnaðar nakað, sigur Oskar, sum sjálvur hevur umboðað Føroyar í golfspæli á oyggjaleikunum.

### Eta áskoðararnar

Finn leggur dent á, at hóast teir ikki røkka so langt í altjóða kappingum, so er tað serliga á tað sosiala, at denturin verður lagdur. Golf er nevniliga ein sera sosial ítróttargrein.

- Tá vit fara út at spæla golf, eru vit millum ein og fýra, sum fylgjast. Men tað er einki stuttligt at vera einsamallur, tí hóast tú kanska fært meiri burturúr, so er skrekkurin at vera einsamallur og fáa hole-in-one. Tí um eingin er, sum kann vátta tað, so telur tað ikki við, sigur Finn flennandi.

- Hóast vit fylgjast, so eru vit ikki kappingarneytar. Kappingin er við teg sjálvan og við vøllin. Hvussu kanst tú vinna á vøllinum við at nýta so fá sløg, sum gjørligt? Og hvussu kanst tú fáa eitt betri úrslit, enn tú fekk seinast? Vit hjálpa hvørjum øðrum og geva góð ráð, meðan vit eru úti, greiðir Oskar frá.

Hóast Tórshavnar Golfklubbi skipar fyri einum 20 kappingum árliga, so er synd at siga, at tað dregur nógvar áskoðarar.

- Áskoðararnir eru teir seyðirnir, sum ganga á Glyvursnesi. Og hvørt ár hava vit eina jólaveitslu, har vit eta ræst kjøt frá bóndanum har úti. So man kann gott siga, at vit hvørji jól eta einar tríggjar av okkara áskoðarum, sigur Finn.



*Finn Jensen, Oskar Eirikson og Mogens Brinx í góðum lag úti á golfvøllinum*